VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fleyr til gul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið hósdagin:
Lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og avfall av og á, sum frálíður partvís vátaslettingur. Hitin millum 2 og 6 stig.

Norðoyingar bíða

Í fyrsta lagi um ársskiftið 2005–2006 verður klárt at koyra undir Leirvíksfjørð

TUNNIL
Heri á Rógvi

Í Klaksvík mugu tey enn nýta bátarnar til ferðing um Leirvíksfjørð

Har eitt kjak endar byrjar eisini eitt nýtt. Soleiðis er tað so mangan, og nú Vágatunnilin verður hátíðarhildin, so liggur ein tunnil – hóast tað ikki enn er nakar tunnil – og spøkir.

Norðoyatunnilin undir Leirvíksfirði eru tað mong, ið bíða eftir.

Dávid Reinert Hansen, sum eisini er stjóri fyri Norðoyatunnilin, sigur, at norðoyingar og øll onnur í fyrsta lagi kunnu sleppa at koyra undir Leirvíksfirði um ársskiftið 2005-2006.

– Gjørt er eitt prosjekt, har tunnilin verður gjørdur fyri 325 milliónir. Treytað av øllum loyvum kunnu vit tøkniliga fara ígongd í vár, men fyrst má tann politiski parturin fáast frá hondini, sigur Dávid Reinert Hansen.

Arbeiðið verður mett at fara kosta 325 milliónir. Í løtuni eru broytingar í løgtingslógini um fast samband um Leirvíksfjørð til viðgerðar í tinginum. Málið liggur nú hjá Vinnunevndini.

Ætlanin hjá landsstýrismanninum í samferðslumálum, Bjarna Djurholm, er, at peningur skal játtast til arbeiðið á fíggjarlógini til og við 2009.

Áðrenn farast kann ígongd við arbeiðið, so skal landsstýrismaðurin eisini hava funnið eina loysn upp á trupulleikan við vegagerðini í Leirvík. Eingin loysn er funnin á trupulleikan, hvussu ferðslan skal leiðast úr Leirvík til minsta ampa fyri bygdina.

– Hetta skal vera komið upp á pláss, áðrenn vit kunnu fara í holt við okkara arbeiði og gera veg til tunnilin, sigur Dávid Reinert Hansen.

Hann nevnir, at teir skulu í hesum sambandi eisini fáa eina rød av loyvum, m.a. frá Friðingarnevndini í Leirvík.

Fæst ein loysn á trupulleikunum, so kann arbeiðið fara ígongd í vár. Arbeiðið verður fíggjað á sama hátt sum við Vágatunlinum. Eitt byggilán og eitt langtíðarlán verða veidd P/F Norðoyatunnilin, og landið skal so við játtanum á fíggjarlógini gjalda byggiláni aftur, og tað verða brúkararnir,sum skulu standa fyri at gjalda langtíðarlánið aftur.

NCC, sum hevur gjørt Vágatunnilin, hevur indikerað fyri Norðatunnilin, at teir kunnu gera arbeiðið upp á Norðoyatunnilin fyri somu takstir sum Vágatunnilin við ávísum broytingum.

Eftir ætlan skal tunnilin fara av Borðoyarvík og koma upp miðskeiðis millum Leirvíksbygd og Brennistøðina.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	9
Nuuk	÷1
Qaqortoq	0
Ammassalik	3
Saint John's	0
Halifax	÷13
Reykjavík	6
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	6
Lerwick	4
Aberdeen	5
London	5
Tromsø	2
Bergen	÷2
Oslo	–
Stokkhólm	÷5
Keypmannah.	0
Helsinki	÷5
Moskva	–
Berlin	÷8
Warzawa	÷10
Kiev	÷12
Bukarest	÷8
Paris	0
Madrid	5
Róm	8
Malorca	14
Athen	7
Malta	15
Tunis	15
Beijing	0
New Dehli	19
Bangkok	31
Jakarta	30
Sydney	–
New York	÷3
Miami	26
Los Angeles	15
Meksikobýur	15
Panama	31
La Paz	15
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	21

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst, 1043 hPa yvir Suður-Noreg fer spakuliga í landsynning. Eitt djúpt lágtrýst, 965 hPa í útsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani fer spakuliga eystureftir.

Hátrýstið yvir Skagerrak stendur mestsum í stað og viknar. Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 09/12 kl. 06⁰⁰– 10/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,7°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,3 mm – mált frá 09/12 kl. 06⁰⁰– 10/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 37,7 mm

VESTFALLSKYRRINDI

11. des.: Fyrra kvarter
14. des.: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
11. des.	—	12.25	11.25	23.59	11.40	—	01.50	14.25	02.50	15.25	10.40	23.14	09.40	22.14	00.05	12.40	01.05	13.40	—	12.10	00.50	13.25
12. des.	00.59	13.33	—	12.33	00.14	12.48	02.59	15.33	03.59	16.33	11.48	—	10.48	23.22	01.14	13.48	02.14	14.48	00.44	13.18	01.59	14.33
13. des.	02.07	14.25	01.07	13.25	01.22	13.40	04.07	16.25	05.07	17.25	00.22	12.40	11.40	23.59	02.22	14.40	03.22	15.40	01.52	14.10	03.07	15.25
14. des.	02.44	15.02	01.44	14.02	01.59	14.17	04.44	17.02	05.44	18.02	00.59	13.17	—	12.17	02.59	15.17	03.59	16.17	02.29	14.47	03.44	16.02

5 707265 100036 >